HEILSU- OG INNLENDISMÁLARÁÐIÐ

# Landsapotekari

**Starvið sum landsapotekari verður við hesum lýst leyst til setan 1. juni 2017 ella eftir nærri avtalu**

Landsapotekarin er ovasti leiðari fyri apoteksverkið og hevur mótvegis Heilsu- og innlendismálaráðnum endaligu ábyrgdina av virkseminum.

**Uppgávurnar eru í høvuðsheitunum hesar:**

- ábyrgd fyri ráðlegging, raðfesting, ígongdseting og samskipan av arbeiðsuppgávunum í apoteks-verkinum,
- ábyrgd fyri støðugari menning í apoteksverkinum, soleiðis at apoteks-verkið á heilivágsøkinum livir upp til nútíðarkrøv,
- ábyrgd fyri at gera uppskot til fíggjarætlan fyri stovnin,
- ábyrgd av, at góðkend fíggjarætlan verður hildin,
- ábyrgd fyri at hagtøl fyri samlaðu heilivágsnýtsluna í føroyska samfelag-num eru tøk,
- ábyrgd av at røkja nærri útgreinaðar myndugleikauppgávur og ráðgeva Heilsu- og innlendismálaráðnum um heilivág í síni heild, eftirlit við at lóggávan viðvíkjandi apoteksverk-inum v.m. verður hildin dagførd,
- ábyrgd av samstarvi um heilivágs-viðurskifti við útlendskar stovnar og myndugleikar.

**Førleikar**

Landsapotekarin skal hava staðið danskt farmaseutiskt kandidatprógv ella samsvarandi prógv, sum er góðkent at lúka sáttmála við onnur lond. Harumframt verður kravt, at viðkom-andi í starvi hevur víst seg skikkaðan at reka apotek.

**Tann rætti umsøkjarin skal harumframt hava:**

- áhuga og vitan um heilsuverkið í síni heild,
- góð leiðslu- og samstarvsevni,
- ein mennandi leiðslustíl,
- evni at seta í verk fyriskipanir,
- vitan um fíggjarstýring og heilsubúskap,
- góð samskiftisevni í skrift/talu.

**Løn- og setanarkrøv**

Setanarøkið er Apoteksverkið og Heilsu- og innlendismálaráðið við undirliggjandi stovnum. Viðkomandi, ið settur verður, skal kunna tola broytingar í starvinum, bæði í starvsinnihaldi og vavi.

Næsti fyrisetti er aðalstjórin í Heilsu- og innlendismálaráðnum. Lønin er ásett sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Pharma Danmark.

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til: Turid Arge, aðalstjóra, á t-posti: turid.arge@himr.fo ella tel 30 40 50.

Umsókn við CV og avriti av neyðugum skjølum skal sendast til:

**Heilsu- og innlendismálaráðið**
**Eirargarður 2,**
**100 Tórshavn**
**himr@himr.fo**

**Umsóknarfreist: 19. apríl 2017, kl. 12:00.**

---

*Heilsu- og innlendismálaráðið umsitur heilsumál, orkumál, kommunumál, umhvørvismál og familjurættarlig mál, og veitir landsstýrinum ráð, tryggjar haldgott grundarlag og ger hugskot til veruleika.*